**Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.10**

Í sendingini verður m.a. ein eldrivin súkkla royndarkoyrd. Vitjað verður á fyrstuhjálparskeiði fyri bilførarar. Eisini fáa vit at vita, hvat ein servicebilur verður nýttur til.

# KURNAR FERRARI






**KIRKJA**

*Kirkjuklokkurnar í Maranello ringja, tá Ferrari vinna í Formel 1 kappkoyring*




**ELTØKNI**

*Anders Berg frá MC-Søluni við elsúkkluni, ið sær út sum ein vanlig súkkla*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

## MC-Sølan við elsúkklu

Akførini verða alt meira elektrisk. Nú er MC-Sølan í Havn komin við eini elektriskari súkklu, sum er sera væl egnað til koyring í Føroyum við nógvum brekkum.

Talan er um eina súkklu av slagnum MBK við innbygdum elmotori í forhjólsnavinum og battaríi undir viðførisberaranum aftan.

Súkklan, sum hevur 7 gear, er so løtt at koyra, at til ber at sita á henni líkamikið hvussu brøtt brekkan er. Elmotorurin er 250W og lithium battaríið er 36V. Elmotorurin verður bert nýttur, tá tørvur er á tí. At síggja til sær el-súkklan út sum ein vanlig súkkla.

MBK-súkklan verður royndarkoyrd í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.10

**mg**

## Fiat Dublò til 7 persónar

Fiat eru komnir á marknaðin við einum nýggjum Doblò, sum er ein rúmligur og praktiskur 7-persónabilur við dragihurðum á báðum síðum

Dobló kann eisini nýtast sum ein 5-persónabilur við sera stórum viðførisrúmi. Við at taka tey aftastu setrini úr bilinum verður viðførisrúmið heilar 800 litrar. Bilurin er væl útgjørdur við nógvum innbygdum trygdarskipanum.

Fiat Doblò fæst í útgávunum Family við 95 hk bensinmotori og Family Pack við 90 hk MJT dieselmotori. Bilurin kann síggjast og roynast hjá Nordcar við Velbastaðvegin. Prísur úr 189.000.

**mg**



*Fiat Doblò. 7-persónabilur fyri undir 200.000 krónur*